SOSIALRÁÐGEVARAFELAG FØROYA

Ummæli til uppskot til broyting í løgtingslóg um barnavernd (barnaverndarlógin).

Sosialráðgvarafelag Føroya vil gera vart við, at sum um heild mangla vegleiðingar til lógina um barnavernd.

Til upprunalógina eru drúgvar viðmerkingar, sum eru upplýsandi og vegleiðandi. Vit sakna dagførdar viðmerkingar til lógina, umframt til tær broytingar, sum eru gjørdar gjøgnum árini.

Upprunalógin er á donskum, men broytingnar eru ikki umsettar til dankst. Eisini vil Sosialráðgevara Føroya gera vart við, at fólkavøksturin uttaneftir hevur gjørt, at tað dagliga er stórur tørvur á barnaverndarlógini á enskum.

Til 1, §14 stk. 7:
Her vantar ein frágreiðing um, hvør orsøkin er, at talan bert er um børn, ið búgva í Danmark og ikki øðrum londum.

Til 2, §15 stk. 1 nr. 12:
Her vantar nærri frágreiðing um hvat slag av hjálp verður hugsað um til familju, ið ikki longur er fevnd av § 15 stk. 1 nr. 1-11.

Til 4, § 19 stk. 5:
Bert "foreldramyndugleikan" verður nevndur. Tað kann vera viðkomandi við hjálp til systkin, makar og onnur, ið standa foreldramyndugleikahavaranum nær.

Til 5, § 21 stk. 3:
Orðingin er ov ógreið. Tørvur er á neyvari lýsing av hvat meint verður við. Tað má verða greitt, hvar markið gongur millum hvat Barnaverndarnevndirnar sjálvar kunnu avgera, tá tað kemur til at flyta uppihaldsstað, og hvat krevur avgerð frá Føroya Kærustovni.

Til 7, § 58 stk. 4:
Ynskiligt er at fáa upplýst hvørjar treytir skulu leggjast til grund fyri slíka avgerð. Vandi kann verða fyri, at mál koma at skifta runt millum barnaverndartænasturnar, tá borgarin er ónøgdur, til dømis, hvør rindar fyri málið. Aðrar loysnir kundu eitt nú verið:

- at barnaverndartænasturnar kring landið verða býttar í størri eindir.
- brúka uttanhýsis fakligar konsulentar.
- tilvitað at menna og nýta faklig háttarløg, fyri at betra um samstarvið millum partarnar.

Vinarliga
Nevndin í Sosialráðgevarafelag Føroya